*Alex Buvik um tilbúgvingina í sambandi við komandi oljuleiting á landgrunninum:*

# Ikki komnir á mál enn men gera alt fyri at vera klárir

*-Vit fara at seta allar kreftir inn á at fáa tilbúgvingina klára til oljuletitting í ár 2001. Boribyrjanin fer ikki at verða seinkað, men tað kunnu koma broytingar í tí máta, sum tilbúgving verður praktiserað uppá sigur Alex Buvik, sum stendur fyri tilbúgvingini í Oljumálastýrinum. Vit mugu gera okkum greitt, hvussu vit vilja skipa bjargingartænastuna og hvør skal hava høvuðsábyrgdina at taka ímóti eini neyðstøðufráboðan og seta skipanina í verk, um tað verður úr Føroyum ella sum nú úr Íslandi ella Skotlandi*

JAN MÜLLER

Nú tað nærkast eini komandi oljuleiting á landgrunninum skulu eisini føroyingar hava fleiri viðurskifti uppá pláss - viðurskifti, sum eru av stórum týdningi fyri bæði føroyskar myndugleikar og oljufeløgini. Eitt av hesum viðurskiftum er ein tilbúgvingarætlan, og hana hevur tað eisini verið arbeitt við nú í eina tíð.

Og eins og í øðrum spurningum í sambandi við tilrættalegging og fyrireiking av komandi oljuleiting, so hevur eisini verður hugt at, hvussu tilbúgving virkar og riggar í okkara grannalondum, har olja leingi hevur verið ein týðandi táttur í samfelagnum.

Nú um dagarnar vórðu umboð fyri føroysku tilbúgvingarverkætlanina á vitjan í Skotlandi, har oljufelagið Texaco setti tey í samband við fólk og pláss, sum hava týdning fyri tilbúgvingina.

Ein av luttakarunum var Alex Buvik, sum starvast hjá Oljumálastýrinum við nettupp tilbúgvingarspurningum. Hann er so eisini formaður í tí partinum av tilbúgvingarbólkinum, sum tekur sær av oljuni.



*Alex Buvik ber ikki ótta fyri, at øll tilbúgvingin ikki skal vera klárt til oljuleitingina, men hann ásannar tó, at vit enn ikki eru komin á mál. -Eg vóni vit klára tað.*



#### Myndugleikar og oljufeløg

Alex Buvik sigur, at eitt av endamálunum við túrinum var at síggja, hvussu samstarvið/samskiftið (interaction“ er millum oljufeløg og myndugleikar í eini neyðstøðu. Á túrinum fingu teir høvi at tosa við umboð fyri coastguard og fingu eina fatan av, hvussu teir arbeiða saman við eitt oljufeløg í sambandi við bjargingartiltøk. Eisini fingu teir eitt gott innlit í, hvussu politiið samstarvar við oljufeløg og onnur, tá ein bjarging fer fram. Høvi var so eisini at síggja, hvørji tiltøk verða sett í verk fyri at forða og avmarka oljudálking. Steðgað varð í einum av firðunum at síggja, hvussu man á staðnum hevur bygt upp eina skipan móti oljudálking. Leiðin gekk eisini til Invernes, har ferðalagið fekk at síggja, hvussu ein býur uppá 60.000 íbúgvar er skipaður og fyrireikaður til eina tilbúgvingarstøðu.

Eisini varð kunnað um, hvørji feløg oljuídnaðurin hevur knýtt at sær í sambandi við at fáa bilbukt við oljudálking á havinum. Har hevur framkomin útgerð alstóran týdning.

Til seinast fingu luttakarnir innlit í, hvussu sjúkrahús- og heilsutænastan virkar í Skotlandi í sambandi við eina tilbúgvingarstøðu í oljuvinnuni.

#### Fingu nógv burturúr

-Eg haldi vit fingu eina rímuliga góða gjøgnumgongd av bretskari tilbúgving sæð í relatión til oljuvirksemi. Allir partar fingu nakað gott burtur úr, og ætlanin er so at gera brúk av royndunum og innlitinum frá túrinum í tí arbeiði, sum tilbúgvingarbólkurin stendur fyri tvs. at fáa felt niður á blað og lagt til rættis ein politikk, sum skal vera grundarlag undir eini tjóðartilbúgving í Føroyum.

Alex Buvik heldur sjálvur, at tað er nógv teir kunnu brúka frá vitjanini, og her eru tær avtalur og kontaktir gjørdar vórðu á túrinum sera týdningarmiklar. Og her er tað ikki minst ta týðandi sambandið, sum skal vera millum Vaktar og Bjargingartænastuna og Costguard.

Uppá fyrispurning hvussu langt er á mál, til vit føroyingar hava ein veruliga landsumfatandi tilbúgvingarskipan at bjóða bæði okkum sjálvum og oljufeløgunum, sum koma her at arbeiða, sigur Alex Buvik, at enn liggur nakað arbeiði eftir at gera. -Enn eru viðurskifti, sum greiða ikki er fingin heilt á. Her m.a. sambandið millum V&B og donsku sjóverjuna. Tað verður arbeitt við hesum.

*-Verður tilbúgvingin klár, tá oljufeløg skulu byrja at bora her í 2001?*

-Eg vóni vit verða klárir.

Alex Buvik nevnir í hesum sambandi, at tað hevur alt at siga at fáa sjálva ávaringarskipanina í eini neyðstøðu uppá pláss: tvs. hvar skal man fyrst ringja. Í dag er støðan tann, at Ísland ella Skotland hava ábyrgdina av havinum kring Føroyar, tá talan er um maritimar bjargingaroperatiónir.

-Vit mugu fáa avklárað hetta og fáa eina avtalu við lutvíst Ísland og Skotland, soleiðis at vit kunnu hava okkara egnu bjargingartænastu og samspæl við Ísland og Skotland, og her má man so avtala, hvør skal taka ímóti fyrstu boðunum.

Alex Buvik sigur, at tað fer at verða gjørd ein avtala um hetta, men tað er so nakað, sum Kai Mortensen, stjóri fyri vaktartænastuni og hansara landssstýrismaður mugu semjast um, hvussu man skal fyrihalda seg til tað.

*-Kann ein manglandi ella ikki fult út nøktandi ella útbygd tilbúgvingarskipan gera, at fyrsta oljuboringin verður ikki fyrr enn í ár 2002?*

-Vit ynskja og fara at seta allar kreftir inn á at fáa alt hetta klárt. Boribyrjanin fer ikki at verða seinkað, men tað kann skapa broytingar í tí máta, sum tilbúgving verður praktiserað uppá.

Alex Buvik sigur, at vit mugu gera okkum greitt, hvussu vit vilja skipa hesa bjargingartænastuna. Skal hon vera undir einum maritimum bjargingar- og samskipanarsentri í Havn, sum hevur fingið álagt ábyrgd at standa fyri operatiónum á landgrunninum ella skulu tað vera Skotland ella Ísland, ið fáa eini neyðboð fyrst og harvið hava høvuðsábyrgdina. Hetta er nakað, sum greiða má fáast á.

Alex Buvik ber sostatt ikki ótta fyri, at alt ikki skal vera klárt til oljuleitingina, men hann ásannar tó, at vit enn ikki eru komin á mál. -Eg vóni vit klára tað.

Tey, ið vóru við á túrinum í Skotlandi, vóru Regin Jespersen frá løgregluni, Hjørdis Gaard frá Vinnumálastýrinum, sum eisini er samskipari í tilbúgvingarbólkinum, Hákun Steingrímson frá Vinnumálastýrinum, Jóhannes Johannesen frá sjúkrabilatænastuni, Djóni Weihe frá V&B og Alex Buvik frá Oljumálastýrinum.

*Tað er sera umráðandi fyri ikki at siga altavgerandi at hava eina trygga tilbúgvingarskipan, áðrenn farið verður undir at leita eftir olju á landgrunninum.*



*Ein góð tyrlutænasta á sjónum eins og ein góð sjúkrabilatænasta á landi eru sera týðandi partar av eini tilbúgving*



## Í býin - altíð eitt stað at fara


**Streymoy**

GÓÐUR DANSUR
í dansistovuni í Vestmanna 24/4 kl. 23.00
Berg og Jacobsens dansi-orkestur spælir
Øll eru vælkomin
UNGTEMPLARA-FELAGIÐ HEYGUR

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Hóskvøldið
Livandi tónleikur
EIVØR PÁLSDÓTTIR KVARTETT spælir
CAFÉ NATÚR
Sosialurin - 311820

Kaggin
Fríggja- og leygarkvøldið spælir
MOON-SHOT
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

fk Mat-seðilin
Hósdagin 13. apríl
**Hakkibúffur**
Fríggjadagin 14. apríl
**Hamburgarryggur**
Leygardagin 15. apríl
**Rullusteik**
Mánadagin 17. apríl
**Milliónbúffur**
Týsdagin 18. apríl
**Knettir**
Mikudagin 19. apríl
**Grýturættur**
*Kostnaður 30.- kr.*
•••
Seinnaparts-tilboð
*frá kl. 14.00:*
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.- Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

**Norðoyggjar**

Klaksvíkar Klubbi
Leygarkvøldið 15. apríl spælir "Ólavur Øster Band" til dans í klubbanum
Fríggjakvøldið spæla teir til dans í Lognbrá
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY
Sosialurin - 311820

sosialurin
www.sosialurin.fo

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

**Eysturoy**

Páskakonsert & dansur
ARIA
FLUX &
ARNFRÍÐ
í Ítróttarhøllini á Kambsdali
Leygarkvøldið 15. apríl
kl. 23⁰⁰ - 04⁰⁰
Kostnaður 100 kr.
Miðil 457969

Vilja tygum vi› í
Í b‡in - hvønn hósdag
Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur